# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 146/2013: Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtings-fíggjarlógini fyri 2015**

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur lagt málið fram tann 31. mars 2014, og eftir 1. viðgerð 7. apríl er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 8., 23. og 30. apríl og 7. mai 2014

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við løgmann og allar landsstýrismenninar.

Fíggjarnevndin hevur seinnu árini víst á, at sbrt. játtanarlógini er ætlanin við játtanar-kørmunum at gera eina yvirskipaða ætlan yvir, hvussu játtanin verður býtt millum málsøkini. Undanfarin ár er landsstýrið komi við einum nærum fullfíggjaðum yvirlitið, ið vísir, hvørji tiltøk skulu gerast fyri at náa kørmunum. Hetta hevur Fíggjarnevndin átalað vísandi til, at hetta ikki er í samsvari við ætlanirnar í játtanarlógini.

Undir viðgerðini hevur nevndin annars býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Bárður Nielsen, Bill Justinussen, Jákup Mikkelsen og Rodmundur Nielsen) vísir á, at verandi uppskot til karmar ikki eins og undanfarin ár inniheldur eina nágreining av tiltøkum niður í smálutir um, hvat landsstýrið ætlar sær at fremja. Fíggjarnevndin hevur áður gjørt vart við, at hetta als ikki er neyðugt, tí Løgtingið ikki kann taka støðu til slíkar ætlanir fyrr enn í samband við viðgerð av fíggjarlógini.

Í uppskotinum til játtanarkarmar fyri 2015 hevur landsstýrið tikið áheitanirnar hjá Fíggjar-nevndini til sín, og er komin við eini yvirskipaðari ætlan um, hvussu samfelagið skal rekast komandi árini. Við hesum metir Fíggjarnevndin, at vit eru komin nærri einum leisti, ið skal brúkast frameftir, og sum er sambært ætlanunum í játtanarlógini. Landsstýrið hevur so í tíðarskeiðnum, fram til at fíggjarlógin skal leggjast fram í heyst, til uppgávu at tryggja sær politiskan meiriluta fyri neyðugum broytingum soleiðis, at fíggjarlógin er í samsvari við játtanarkarmarnar.

Í samband við innkallingarnar hava bæði løgmaður og landsstýrismenn boðað frá, at teir innan karmarnar, hvør á sínum øki, koma at gera uppskot til fíggjarlóg.

Meirilutin vísir annars á, at tað er av stórum týdningi, at fíggjarlógaruppskotið, sum verður lagt fram í heyst, heldur seg innan hesar játtanarkarmar. Og at tað sbrt. § 26 í játtanarlógini áliggur landsstýrismanninum í fíggjarmálum at síggja til, at hvør einstakur landsstýrismaður altíð heldur ásetingarnar í hesi lóg og reglur, gjørdar sambært lógini.

Við hesum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Kristina Háfoss, Eyðgunn Samuelsen og Aksel V. Johannesen) tekur ikki undir við fíggjarkørmunum fyri 2015. Minnilutin í Fíggjarnevndini leggur tí aftur í ár fram aðrar fíggjarkarmar fyri 2015 vegna andstøðuflokkarnar – Tjóðveldi, Javnaðarflokkin og Framsókn.

Hetta er neyðugt, tí samgongan fremur framhaldandi skeivan fíggjar- og búskaparpolitikk.

Andstøðan staðfestir, at møguligt er venda landsins halli til yvirskot skjótari við nýskipanum, javnari býti og ábyrgdarfullum búskaparpolitikki, heldur enn við skeiva búskaparpolitikk-inum hjá samgonguni.

Meðan fíggjalógaruppskotið frá samgonguni væntar eitt hall á 196,7 mió. kr., verður úrslitið hjá andstøðuni eitt hall á 134,8 mió. kr. Munurin er fyrst og fremst grundaður á, at stimbrandi politikkurin fer at skapa alneyðuga tryggleikan í føroyska samfelagnum, geva lág- og miðalløntum umframt barnafamiljum betri fíggjarligt rásarúm, og fer at skapa álit millum føroyingar á, at framtíðarútlitini eru ljós. Hetta fer at økja privatu nýtsluna, sum aftur fer at hækka inntøkur landsins. Andstøðan hevur tí áhaldandi víst, á at tað er skeivur búskapar-poltikkur bara at geva føroyingum við hægru lønunum fíggjarligt rásarúm – soleiðis sum samgongan hevur gjørt.
Eisini vil andstøðan, at fiskivinnunýskipan verður framd, og skipan fyri alivinnuna, ið gevur hesum vinnum tryggar og støðugar karmar at virka innan nú og frameftir. Hetta fer bæði at geva størri virðisskapan til samfelag, fólk og fyritøkur.

Skeivur búskaparpolitikkur ger, at hallið økist
Fíggjarkarmar og fíggjarlógir higartil hjá samgonguni mangla eitt yvirskipað mál fyri okkara land. Hartil tykist einki verða gjørt við veruligu høvuðsavbjóðingarnar, ið samfelagið hevur. Tvørturímóti, so verður í fleiri førum framdur politikkur, ið ger trupulleikarnar størri.

Úrslitið av skeiva búskaparpolitikkinum er, at landskassin hevur havt vaksandi hall seinastu árini, tí hallið er økt bæði í 2012 og í 2013. Hetta hóast sera nógv viðurskifti eru í føroyska búskapinum, ið tala fyri, at landið átti at fingið støðugt betri úrslit:

- Søguliga stór framgongd í uppisjóvarvinnuni - nýggj milliardavirðir eru komin í samfelagið.
- Søguliga góð gongd í alivinnuni. Bert tann eina fyritøkan hevur yvir 700 mió. kr. í yvirskoti.
- Søguliga lág renta.
- Lágt arbeiðsloysi.
- Hartil hevur samgongan tikið inn á fíggjarlógina 3-400 mió. kr. frá forskattaðum pensjónum og øktum tilfeingisgjøldum – hetta eru inntøkur, ið ikki vóru á fíggjarlógini, tá henda samgongan tók við í 2011. Hóast hetta, so er tað eydnast samgonguni at økja hallið bæði í 2012 og í 2013.

Manglandi býti av virðum landsins
Vit eru millum heimsins ríkastu lond. Málið er at fáa sum mest vælferð fyri tey ovurstóru virðir, ið vit hava í landinum.
Mest týðandi liðurin í at fáa sum mest vælferð fyri tað virðið, ið vit hava í samfelagnum, er at tryggja eitt javnt býti av landsins virðum. Her hevur samgongan valt at ganga beint øvugt. Alsamt færri eiga alsamt størri part av landsins virðum.
Manglandi fiskivinnunýskipanin og umsitingin av ovurstóra uppisjóvartilfeinginum hevur skundað undir henda ójavna.

Flatskattalættin styrkti henda ójavna munandi. Háløntt – 5-7.000 í mánaðarligum skattalætta, meðan lágløntt netto hava fingið eina stóra pensjónsskattarokning vegna søguligu stóru hækkingina av pensjónsskattinum.

Manglandi álitisvekjandi politikkur

Annar ómetaliga týðandi liður í at fáa gongd í samfelagshjólini og framgongd er at fremja ein álitisvekjandi politikk, so fólk kenna seg trygg við útlitini. Eisini her hevur samgongan gingið beint øvugt. Fólk hava mist álitið á politisku skipanina. Serliga vegna handfaringina hjá hesi samgonguni av stórmálum.

Úrslitið er m.a., at privata nýtslan, ið stendur fyri meira enn helvtini av allari nýtsluni í samfelagnum, er søguliga lág. Hetta sæst m.a. við:

> MVG inntøkurnar - her er eingin veruligur vøkstur.
>
> Lønargjaldingar - her er heldur eingin veruligur vøkstur (bert tað, ið samsvarar við lønarvøksturin)
>
> Talið av løntakarum stendur meira ella minni í stað – fleiri enn 3000 færri enn fyri fáum árum síðan.
>
> Í frágreiðingini frá februar 2013 metti Landsbanki Føroya, at privata ”nýtslukvotan”, tvs. tann partur av inntøkuni, ið verður nýttur, var heilt niðri á 86,5%. Samlaða tøka privata inntøkan verður í 2014 mett at verða 9,3 mia. kr. Var nýtslukvotan 92%, høvdu 8,556 mia. kr. farið til nýtslu og harvið í umfer í búskapinum, men við nýtslukvotu á 86,5% eru bert 8,045 mia. kr. til nýtslu og umferð í búskapinum. Ein munur á 511 mió. kr. Tá umleið 30% av privatu nýtsluni kemur inn sum inntøkur til landið, høvdu landsins inntøkur verið øktar við 153 mió. kr., um bert privata nýtslan kom upp á eitt lágt miðal støði.

Manglandi nýskipanir

Triðji týðandi liðurin í at fáa vent gongdini er, at nýskipanir verða framdar, ið tryggja fleiri og betri tænastur fyri ta játtan, ið er tøk. Eisini her hevur samgongan valt at ganga øvugt.

> Eingin fiskivinnunýskipan er í eygsjón. Enn er eingin nýskipan framd av fyrisitingini. Innan eldraøkið verður valt at blaka ábyrgdina frá sær, heldur enn at nýskipa økið, og á pensjónsøkinum er lógartvungið inngjald ásett, uttan at størsti parturin av nýskipanini enn hevur sæð dagsins ljós.

Manglandi býtið av virðum landsins, manglandi álit á landsins leiðslu, og manglandi nýskipanir eru sostatt týðandi orsøkir til, at vit ikki hava fingið ta framgongd, ið vit áttu at havt, tá hugsað verður um umstøðurnar annars í búskapinum.

Politisk átøk á trimum økjum eru samstundis lykilin til at venda gongdini.

Manglandi samsvar millum fíggjarkarm, fíggjarlóg og endalig ársúrslit

Ein onnur avbjóðing er, at higartil hevur landsstýrið ongantíð enn hildið teir fíggjarkarmar, ið vóru samtyktir. Á hvørjum ári hevur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, lagt fram fíggjarkarmar, ið fíggjarlógin á heysti ikki hevur hildið seg innan, tá til stykkis kom – hóast alt. Sjálvt fíggjarlógirnar verða ikki hildnar. Ógvusligasti munurin var í fjør. Í 2013 skuldi hallið sambært fíggjarlógini vera 243, men verður nú væl oman fyri 400 mió. kr.

Landsstýrið nýtir kreativar fíggingarhættir

Hildið verður áfram við kreativum fíggjarloysnum. Nú mælir samgongan harafturat til at fara undir fíggjarliga langtíðarleasing av almennum íløgum, har útreiðslurnar verða býttar yvir 20 ár, heldur enn rindað verður so hvørt, bygt verður. Hetta bæði dýrkar og dylur almennar íløgur og leggur upp til loysnir, ið fíggjarpolitiskt eru ómetaliga langt av leið. Landið missir

lættliga tamarhaldið á íløgum sínum, um farið verður undir langtíðar leasing heldur enn at rinda fyri hesar so hvørt, bygt verður. Skjótt verður hópurin av íløgum settur í verk, tí tað sær út til, at ”rúm er fyri hesum á íløgukørmunum”. Samstundis verður landið bundið av út-reiðslum til íløguna 20-30 ár fram. Hetta avmarkar í stóran mun landið í at nýta íløgurnar sum fíggjarpolitiskt amboð, har ferð verður sett á, tá tørvur er á hesum, og færri íløgur verða gjørdar, tá búskapurin er upphitaður.
Tílíkar kreativar leasing-loysnir eru annars eisini royndar aðra staðni, eitt nú í Farum undir Brixtofte-leiðsluni. Hetta verður harðliga frámælt.
Eisini her er landsstýrið á skeivari kós.

<u>Tørvur á konjukturjavnandi politikki</u>

Ein partur av skeiva búskaparpolitikkinum hjá samgonguni er manglandi konjuktur-javnandi politikkur. Tøvur er á einum politikki, har almenni parturin av búskapinum varð stimbraður tey árini, har lágkonjukturur hevur verið, meðan almenni parturin av búskapinum varð tálmaður, tá munagóð framgongd aftur varð í búskapinum. Samgongan hevur gjørt beint øvugt. Tí veruleikin er, at tað almenna eitt nú hevur framt alt ov fáar íløgur seinastu árini, meðan tað nú verður sett gongd á eina røð av almennum íløgum ísenn, samstundis sum privati parturin av búskapinum eisini fer undir fleiri stórar verkætlanir. Hetta er búskaparpolitiskt sera óskynsamt og er við til at gera lágkonjukturar longri og ógvusligari enn neyðugt, og at upphita búskapin skjótari enn neyðugt. Ynskiligt hevði verið, at lóg varð samtykt, ið álegði politisku leiðsluni í landinum at fremja ein konjukturjavnandi politikk.

<u>Sera ivasom tøl í fíggjarkørmum</u>

Tølini í fíggjarkørmunum fyri 2015 og 2016 eru sera ivasom.
Fyri at røkka málinum um yvirskot í 2016 varð í fíggjarkørmunum fyri 2 árum síðan mett, at hallið í 2015 skuldi vera 85 mió. kr. Hetta verður nú í fíggjarkørmunum nærum 200 mió. kr. Hóast úrslitið er vorðið munandi verri seinnu árini, so væntar landsstýrismaðurin framhald-andi yvirskot í 2016.
Við verandi politikki hjá samgonguni er hetta tó sera ósannlíkt. Tað sæst eisini á fíggjar-kørmunum, at meginparturin av sparingunum skulu fremjast í 2016, tvs. eftir at ein nýggj samgonga tekur við, tí løgtingsval verður í seinasta lagi á heysti 2015.
Eisini tølini í fíggjarkørmunum fyri 2015 eru grundað á meira enn ivasom viðurskifti:

Ov lítið er sett av, tá umræður fígging til kommunurnar av eldraøkinum. Bert 372 mió. kr. og einki endurgjald fyri tær 100 mió. kr. í pensjónsskatti, ið landsstýrið tók frá kommununum 1. januar 2012.
Umfatandi sparingar í “pensjónsskipanini” eru partar av fíggjarkørmum hjá sam-gonguni. Lagt verður upp til, at Almannamálaráðið skal spara -37,8 mió. kr. komandi árini. Verður fólkapensjónin avtikin ella pensjónsaldurin hækkaður?
Samgongan vil, at samferðslan aftur skal sparast. Hesaferð við útveiting av Oyggja-leiðum og rationaliseringum. Fer hetta at geva sparingar á fleiri mió. kr.?
Heilsuøkið skal spara yvir 16,4 mió. kr. longu í 2015. Hvussu?
Almannaøkið skal spara 10 mió. kr. í 2015. Hvussu?
Skúla- og mentaøkið skal spara 13,7 mió. kr. í 2015 – uttan at nýskipan tykist at vera í eygsjón.
Miðfyrisitingin skal spara 5 mió. kr. í 2015 og 10 mió. kr. í 2016 – hetta uttan at greiða frá, hvussu.

Tjóðveldi, Javnaðarflokkurin og Framsókn vita, at tøk skulu takast fyri at venda halli til yvirskot, men skal málið røkkast, er alneyðugt, at politiski boðskapurin er greiður,

álítandi og ítøkiligur. Fíggjarkarmarnir fyri 2015 eru ikki álítandi og hava ikki kjølfesti í politisku skipanini.

Landsstýrið tekur uppraðfestingar í 2014 burtur í 2015
Sum heild eru sera nógv ógreinað viðurskifti í fíggjarkørmunum, ið gera tað trupult at meta um, hvørt tað er grundarlag fyri at gera fíggjarlóg fyri 2015, ið livir upp til fíggjarkarmarnar.

Í sambandi við viðgerðina av fíggjarkørmunum fyri 2015 hava fleiri landsstýrisfólk eisini gjørt vart við, at tað ikki eru tey, ið hava ásett tey tøl, ið eru í fíggjarkørrm-unum, men at tað er landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, ið hevur ásett tey. Fleiri landsstýrisfólk hava eisini víst á, at tey meta, at tað fer at krevja stór spariátøk bæði innan rakstur og stuðulsjáttanir fyri at røkka tølunum í fíggjarkørmunum fyri 2015. Eisini er undir viðgerðini í Fíggjarnevndini staðfest, at tær uppraðfestingar, ið Fíggjarnevndin framdi millum 1. og 2. viðgerð av fíggjarlógini fyri 2014, eitt nú av SSL (lækka ferðaseðlakostnað 15%), Mentanargrunninum, Føroya Symfoniorkestri, Musikkskúlanum, Felagnum lesi- og skriveik, ÍSF v.m. eru allar tiknar burtur úr játtanini til landsstýrisfólkini í fíggjarkørmunum fyri 2015. Hesum tekur minnilutin als ikki undir við.

Samgongan fremur skeivan politikk
Í staðin fyri at skapa álitsvekjandi politikk og ein politikk, ið stimbrar búskapin, hevur sam-gongan seinnu árini ført ein politikk, ið hevur skapt ótryggleika hjá nógvum húsarhaldum og í vinnuni. Í fleiri førum eru framd átøk, sum, sagt verður, spara, men sum í veruleikanum ikki gerast til sparingar á fíggjarlógini, tí hesar minka um privatu nýtsluna og harvið lækka inntøkur landsins. Ein sera neilig ringrás. Dømi um samgonguátøk, ið ikki stimbra samfelagnum:
Fremja ikki átøk í heildarætlanini fyri fólkavøkstur
Økja um munin á realløn hjá lágløntum og háløntum
Senda stóra pensjónsskattarokning til lág- og miðallønt
Hava undanfarin ár ikki givið lønarframskrivingar til fleiri øki, og minka harvið talið av størvum
Lækka rentustuðulin, og ger tað fíggjarliga tyngri fyri húsarhald við stórum lánum.
Skert játtanina til Fróðskaparsetrið við niðurskurði og manglandi lønarframskrivingum. Síðan hækkað eitt vet aftur.
Minkað játtan til Mentanargrunn Føroya við 20%. Síðan hækkað eitt vet aftur.
Undirgravað inntøkugrundarlag landsins við at lata ófíggjaðan flatskattalætta, samstundis sum framtíðar pensjónsskattainntøkur verða brúktar nú og koma at mangla hjá komandi ættarliðum.
Avtikið einasta óhefta tjóðarbúskaparliga stovn Føroya - Landsbanka Føroya
Hækka ríkisveitingina og harvið gjørt tað øvugta av at røkka einum sjálvberandi búskapi.
Eingin fiskivinnunýskipan, eingin nýskipan av fyrisiting, og pensjónsskipanin hongur í leysum lofti, tí eingin veit, hvat fer at henda við fólkapensjón og Samhaldsfasta.

Andstøðan vil fremja stimbrandi búskaparpolitikk
Tjóðveldi, Javnaðarflokkurin og Framsóknn mæla til sum skjótast at broyta skeiva búskapar-politikkin. Tí við einum stimbrandi, álitsvekjandi og málrættaðum búskaparpolitikki ber til at venda undirskoti til yvirskot, samstundis sum samfelagið verður ment á øllum teimum økjum, ið skulu mennast fyri at skapa framburð.

Vit vilja tryggja føroyingum einar Føroyar í 2015, ið stíla fram ímóti fylgjandi málum:
Fólkavøkstri
Føroyar fyri øll
Sjálvbjargnar Føroyar
Útbúgving og mentan í heimsflokki
Vakstrarskapandi nýskipanum
Menning kring allar Føroyar

Fyri at røkka hesum málum skal ein røð av málrættaðum átøkum setast í verk komandi árini, og hevur andstøðan í undanfarnum uppskotum til fíggjarkarmar og fíggjarlógir víst á, júst hvørji átøk valt verður at raðfesta. Hesi eru eisini partar av tølunum aftanfyri hesar andstøðu-fíggjarkarmar.

Tá fíggjarkarmar ikki skulu fara niður í smálutir – eins og fíggjarlógir – skal her bert verða víst á nøkur av mongu málunum, ið andstøðan velur at raðfesta fyri at fremja ein meira stimbrandi og savnandi búskaparpolitikk.

Skattanýskipan fremjast

Tjóðveldi, Javnaðarflokkurin og Framsókn vilja at skattanýskipan skal fremjast, ið inniheldur allar tættir í skatta- og avgjaldsskipan landsins. Endamálið skal vera at deila landsins virðir betur millum alt fólkið í landinum, og at víðka inntøkur landsins soleiðis, at skatturin á arbeiði kann lækkast munandi, samstundis sum inntøkur verða fingnar inn aðrar vegir. Skatturin skal lækkast hjá lág- og miðalløntum, og harvið gerst skattastigin meira progressivur.
Samstundis verður barnafrádrátturin hækkaður úr 6.500 kr. pr. barn upp í 8.000 kr. pr. barn. Kostnaðurin fyri hetta verður mettur at vera góðar 21 mió. kr., og er játtan sett av til hetta í 2015. Eisini verður barnaískoyti til stakar uppihaldarar hækkað úr 544 kr. pr. mánað pr. barn upp í 800 kr. pr. mánað pr. barn, og eru 2,6 mió. kr. settar av til hetta.

Fiskivinnunýskipan og betri býti av landsins virðum

Fiskivinnunýskipan skal tryggja, at høvuðsvinnan fær støðugar og kappingarførar karmar at virka innan, samstundis sum skipað verður ein marknaðargrundað skipan, har tryggjað verður, at virðirsøkingin av ogn Føroya fólks gerst so stór sum møguligt.
Tilfeingisinntøkur skulu eitt nú nýtast at lata aftur til føroyingar – serliga lág- og miðallønt – sum skattalættar. Hetta fer at økja keypiorkuna og seta ferð á privatu nýtsluna. Hetta fer aftur at økja inntøkur landsins.
Fyri alivinnuna verður mælt til, at ásett verður eitt sokallað «tøkugjald», ið er grundað á ta nøgd, ið verður ald, faldað við marknaðarprísi. Inntøkurnar frá hesum kundu hóskandi verið býttar millum land og kommunur, soleiðis at kommunurnar m.a. fingu fíggjarligt rásarúm til at hækka botnfrádráttin í kommunuskattinum og harvið lækka skattin hjá lágløntum. Eisini hetta fer at økja um privatu nýtsluna, skapa nýggj størv og geva avleiddar inntøkur til land og kommunur.

Ferðaavgjald burtur og MVG á matvøruvirksemi niður

Ferðaavgjaldið skal minkast, so hetta fellur burtur yvir áramál, og MVG á matstovuvirksemi við serligum atliti til føroyskan mat verður lækkað. Eisini hetta er við í fíggjarkørmunum hjá andstøðuni og fer at stimbra ferðavinnu, vinnur og trivnað.

Átøk at fremja fólkavøkstur, trivnað og økismenning

Minnilutin fer áhaldandi at vísa á, at tað er alneyðugt at fáa uppraðfest átøk, ið skapa fólkavøkstur. Mælt verður tí til at fylgja tilmælunum í álitinum um fólkavøkstur, ið mælir til eina røð av átøkum innan hægri útbúgving, mentan og trivnað. Herundir 10 mió. kr. eyka til Fróðskaparsetur Føroya til nýggjar útbúgvingar, at taka fleiri lesandi inn, skipa fjarundirvísing v.m., og 15 mió. kr. eyka til vinnurættaða gransking. Samgongan velur tíverri ikki at taka tilmælini til sín, men andstøðan velur at taka tilmælini við í andstøðu-fíggjarkarmarnar. Fyrsta árið inniber hetta eina meirútreiðslu á 32 mió. kr.
Hartil er ein røð av øðrum átøkum raðfest, eitt nú at fólkapensjónin hækkar fyri tey, ið bert hava fólkapensjón og samhaldsfasta at liva av. 17 mió. kr. verða settar av til hetta. Víst verður annars til andstøðuuppskotið til fíggjarlóg fyri 2014 og fíggjarkarmar undanfarna ár.

Eldraøkið
Tá umræður játtan til eldraøkið, so velur minnilutin ikki at flyta tær 372 mió. kr. til kommunurnar, og at minka inntøkurnar samsvarandi, so sum samgongan ger í fíggjarkørmunum. Tí minnilutin metir bæði, at hetta er ein ov lítil upphædd, og at málið at flyta alla ábyrgd av eldraøkinum og part av heilsuøkinum til kommunurnar als ikki er klárt av flyta 1. januar 2015. Tí samgongan hevur valt at samtykkja lóg, ið flytur ábyrgdina, uttan at hava tikið støðu til eina røð av grundleggjandi viðurskiftum. Eisini eru kommunur og land enn í samráðingum um, hvør fígging skal flytast frá landi til kommunur, tá ábyrgdin av eldraøkinum verður flutt. Samanumtikið eru sostatt fleiri viðurskfiti, ið eru eftir at lýsa og samráðast um, áðrenn ítøkilig tøl kunnu ásetast í fíggjarkørmum.

## SAMANUMTIKIÐ

Tjóðveldi, Javnaðarflokkurin og Framsókn vilja eina heilt aðra leið fyri Føroyar, og ein stimbrandi og savnandi politikk, ið fer at skapa framgongd fyri allar føroyingar munandi skjótari enn tálmandi og spjaðandi politikkurin hjá samgonguni. Alneyðugt er við einum fíggjar- og búskaparpolitikki, sum gagnar heildini og fjøldini, og sum byggir á teir ríku og fjølbroyttu møguleikar, ið vit hava í Føroyum. Við at fylgja uppskotinum hjá andstøðuni sæst, at vit røkka skjótari einum sjálvberandi búskapi við stimbrandi – heldur enn tálmandi – politikki.

Samanumtikið merkja broytingar frá minnilutanum, at hallið á fíggjarlógini fyri 2015 verður **134,8** mió. kr. í mun til eitt hall á 196,7 mió. kr. í fíggjarkørmunum hjá samgonguni.

Hetta eru yvirskipaðu broytingarnar í inntøkum, rakstrarútreiðslum og íløguútreiðslum:

## INNTØKUR

Andstøðu-fíggjarkarmarnir merkja broytingar, ið økja inntøkur landsins við **161** mió. kr. í mun til fíggjarkarmarnar hjá samgonguni. Harumframt verða 372 mió. kr. ikki fluttar kommununum ísv. eldraøkið, tí mett verður ikki, at málið er klárt, og upphæddin ikki er samsvarandi veruliga kostnaðinum av eldraøkinum. Tær 161 mió. kr. í inntøkum, ið koma afturat í mun til samgongu uppskotið:

| **Átak** | **Mió.kr.** | **Viðmerking** |
|---|---|---|
| Inntøkur frá øktum TAKS eftirliti | 16 | |
| Hækkaður barnafrádráttur | 21 | -14,7 (30% innaftur) |
| Hækkað barnaískoyti til stakar uppihaldarar | 2,6 | -1,82 (30% innaftur) |
| Brúksgjald ísv. fiskivinnunýskipan og alivinnu | 50,0 | Íalt 170+**50**=220 |

| | | |
|---|---|---|
| Gular nummarplátur | 5,0 | |
| Avleiddar inntøkur frá hægri rakstri | 37,5 | |
| Avleiddar inntøkur frá hægri íløgum | 9,9 | |
| Lækka ferðaavgjaldið so hetta fellur burtur | -3 | |
| Minka MVG á matstovuvirksemi – føroyskur matur | -2 | |
| Taka burtur prístalsvøkstur í ríkisveiting | -13,3* | |
| Avleiddar inntøkur frá øktar nýtslukvotu (3% øking) | 83,7** | |

** Tjóðveldi og Framsókn taka ikki undir við hækking av ríkisveitingini, sum er partur av fíggjarkørmunum hjá samgonguni, og hava tí lækkað inntøkurnar við 13,3 mió. kr. í broytingaruppskotinum. Javnaðarflokkurin hevur tikið undir við lógini, ið prístalshækkar ríkisveitingina. Hetta merkir, at inntøkurnar høvdu verið 13,3 mió. kr. hægri. Javnaðarflokkurin hevur broytingaruppskot hesum viðvíkjandi.*
***Metingin á øktar inntøkur á 83,7 mió. kr., eru neyvt útroknaðar og varligar metingar av øktum inntøkum vegna hækking í nýtslukvotuni úr 86,5% upp í 89,5%. Av øktu nýtsluni væntast 30% at koma inn í avleiddum skattum og avgjøldum til landið. Hetta fer lættliga at gerast úrslitið av einum politikki, ið aftur skapar álit á framtíðina og setir gongd á samfelagshjólini.*

## ÚTREIÐSLUR

### ÍLØGUR

Andstøðu-fíggjarkarmarnir økja játtanina til íløgur landsins í mun til uppskotið frá samgonguni. Netto er talan um **33** mió. kr. meira í mun til fíggjarkarmar hjá samgonguni. Í høvuðsheitum er munurin við fylgjandi íløgum:

3 mió. kr. til at fara undir fyrstu stigini til eitt Tjóðleikhús (hartil eru støðlaðar um 5 mió.).
2 mió. kr. til at seta ferð á at digitalisera bandasavnið hjá KVF.
4 mió. kr. til at seta gongd á – saman við Bústøðum og kommunum – at byggja lestraríbúðir.
3 mió. kr. til at tillaga verandi bygning til ein føroyskan eftirskúla.
5 mió. kr. til Orkugrunn, ið skal stuðla grønum orkuverkætlanum kring Føroyar.
8 mió. kr. til at seta gongd á at byggja nýtt Havrannsóknarskip.
3 mió. kr. til at fyrireika Hvalbiartunnil.
5 mió. kr. til útgerð til smærri tunnilsverkætlanir.

Fróðskaparsetur Føroya skal hava nýggjar og dagførdar karmar samsvarandi heildarætlanini fyri fólkavøkstur, og verður játtan sett av til hetta samsvarandi. Tilmælini í heildarætlanini mæla til at seta munandi hækkaðar upphæddir til rakstur fyrsta árið, meðan íløguparturin gerst munandi størri fylgjandi árini, og fylgir andstøðuuppskotið hesum tilmæli.

### RAKSTRARÚTREIÐSLUR

Andstøðu-fíggjarkarmarnir fara at økja samlaðu rakstrarútreiðslur landsins við 1,8% í mun til uppskotið frá landsstýrinum. Tí hetta er neyðugt fyri at venda burtur frá tálmandi politikkinum, ið seinkar vøkstri og framburði, og heldur fremja eina røð av stimbrandi átøkum, ið far at skapa framgongd og fólkavøkstur.
Ítøkiligu átøkini eru at finna í andstøðu-fíggjarlógini fyri 2014 og andstøðu-fíggjarkørmunum

fyri 2014. Nevnast kann, at økti raksturin kemur í stóran mun innaftur umvegis avleiddar skatta- og avgjaldsinntøkur.

Samanlagt verða rakstrarútreiðslur landsins við broytingaruppskotinum **75** mió. hægri enn í fíggjarkørmunum hjá samgonguni, harumframt verða útreiðslur á 372 mió. kr. ikki fluttar, tí mett verður ikki, at eldraøkið er klárt at flyta kommununum.

**SAMLAÐ ÚRSLIT – RLÚ 1**

Minnilutin mælir samanlagt til broytingar, ið gera úrslitið hjá landskassanum **61,9** mió. kr. betri enn úrslitið í fíggjarkørmunum frá samgonguni.

Hallið fer sostatt niður á **134,8** mió. kr. við andstøðu-fíggjarkørmunum, og skal orsøkin fyrst og fremst finnast í einum stimbrandi og savnandi politikki – mótvegis tálmandi og spjaðandi samgongupolitikkinum. Hetta gevur eitt nú øktar avleiddar inntøkur til land og kommunur.

Tjóðveldi, Javnaðarflokkurin og Framsókn leggja hervið fram felags fíggjarkarmar fyri 2015. Men av tí, at Javnaðarflokkurin hevur tikið undir við prístalshækking av ríkisveitingini, leggja umboðini úr Javnaðarflokkinum eisini fram broytingaruppskot, har einasti munurin er, at prístalshækking av ríkisveitingini verður løgd afturat á inntøkusíðuni. Tjóðveldi og Framsókn taka ikki undir við hækking av ríkisveitingini.

**Minnilutin** (Kristina Háfoss) setir, vísandi til omanfyristandandi viðmerkingar, fram soljóðandi:

**B r o y t i n g a r u p p s k o t**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2015**

| Tús. kr. | **Rakstur** | **Íløgur** |
|---|---|---|
| Løgtingið | 47.400 | 0 |
| Løgmansskrivstovan | 59.900 | 2.000 |
| Fíggjarmál | 348.600 | 82.600 |
| Fiskivinnumál | 172.200 | 8.000 |
| Vinnumál | 312.400 | 37.000 |
| Mentamál | 1.018.120 | 133.000 |
| Heilsumál | 935.000 | 35.000 |
| Almannamál | 1.793.100 | 31.300 |
| Útreiðslur tilsamans | 4.686.720 | 328.900 |

| | |
|---|---|
| Útreiðslukarmur | 5.015.620 |
| § 20 Inntøkur | 4.880.790 |
| Inntøkukarmur | 4.880.790 |
| RLÚ-úrslit | -134.830 |

**Minnilutin** (Aksel V. Johannesen og Eyðgunn Samuelsen) setir, vísandi til omanfyristandandi viðmerkingar, fram soljóðandi:

**Uppskot**
**til**
**samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2015**

| Tús. kr. | **Rakstur** | **Íløgur** |
|---|---|---|
| Løgtingið | 47.400 | 0 |
| Løgmansskrivstovan | 59.900 | 2.000 |
| Fíggjarmál | 348.600 | 82.600 |
| Fiskivinnumál | 172.200 | 8.000 |
| Vinnumál | 312.400 | 37.000 |
| Mentamál | 1.018.120 | 133.000 |
| Heilsumál | 935.000 | 35.000 |
| Almannamál | 1.793.100 | 31.300 |
| Útreiðslur tilsamans | 4.686.720 | 328.900 |

| Tús. kr. | **Rakstur** |
|---|---|
| § 20 Inntøkur | 4.894.090 |
| Inntøkukarmur | 4.894.090 |
| RLÚ-úrslit | -121.530 |

**Fíggjarnevndin, 7. mai 2014**

Bárður Nielsen
formaður

Kristina Háfoss
næstformaður

Jákup Mikkelsen

Rodmundur Nielsen

Bill Justinussen

Eyðgunn Samuelsen

Aksel V. Johannesen